## Statoil í vindorku

Norska Statoil/Hydro arbeiðir við einari ætlan um at seta 88 havvindmyllur úti fyri ensku eysturstrondini. Vindmyllurnar verða ætlandi settar upp á 10 favna dýpi einar 10 fjórðingar eystur úr býnum Norfolk. Árliga framleiðslan er mett til 1,1 TWh. Talan er um eina verkætlan, sum Statoil/ Hydro og enska felagið Evelop eru felags um, og partarnir skulu eiga 50 prosent í part. Gongst sum ætlað, fara myllurnar at mala um trý ár, skrivar NTB.




## Ferja aftur seinkað

Tað gongst sera illa hjá norska ferjureiðarínum Color Line at fáa fatur á teirri nýggju ferjuni, sum skal sigla ímillum Suðurnoreg og Danmark. Upprunaliga skuldi ferjan fara í sigling í desembur, men nú er greitt, at tað verður í fyrsta lagi 13- mars ella eina viku fyri páskir. Tað er Aker-skipasmiðjan í Finnlandi, sum byggir ferjuna. Talan er um eina skjóttgangandi ferju, og tað er ikki av ongum, at hon hevur fingið navnið Superspeed 1.

# Ávara móti »eurosering«

**Stigvísa »euroseringin« av íslendska búskapinum er »ógvuliga trupul og allarhelst óstøðug«, er ávaringin, sum íslendska stjórnin fekk í síðstu viku. Samstundis varð heitt á stjórnina um at velja millum egna krónu ella evruna**

BÚSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Serfrøðingar eru ósamdir um, hvørt tað er rætt at eurosera íslendska fíggjarmarknaðin*

Richard Portes, óhefti høvundurin av eini frágreiðing um íslendska búskapin, sigur, at einvegis eurosering var møgulig, og nýtist ikki at ávirka politiska íslendska sjálvræði.

- Orsakað av óvanliga høgum peningakursum gera sína ávirkan á íslendsku prísirnar, og líka óvanliga stórur fíggjarligur opinleiki í Íslandi, fer einvegis eurosering ikki at ávirka peningaliga politiska frælsi, greiddi hann íslendska handilskamarinum frá.

Hetta kemur fram í eini tíð, har kjakið seinastu vikurnar er økt um Íslendska eurosering, eftir at Landsbankin Íslands hevur nokta eini umbøn frá landsins størstu fyritøku um at skrotta krónuna og nýta evruna ístaðin.

Kaupthing, sum hevur eitt samlað virði av 420 milliardum donskum krónum, søkti, sum næsti íslendski bankin, um at skráseta sínar konti, fíggjarligu fráboðanir og partabrøv í evrum. Aðrar fyritøkur ynskja eisini at gera tað sama.

Men á sama fundi í handilskamarinum, sum Portes legði sína frágreiðing fram, segði ein nevndarlimur í einum stórum europeiskum banka, Jürgen Stark, at hansara banki var ímóti, at eitt ikki-europeiskt land einvegis slapp inn í evru-samgonguna.

- At eitt ES-limaland ella ein komandi ES-limur sleppur at taka eitt »short cut« inn í moneytaru samgonguna. heldur enn at ganga almenna vegin, kann gerast eitt afturstig fyri tað landið og kanska fyri alt evruøkið, segði hann.

Richard Portes heldur tó, at kostnaðurin av at fara upp í evru-samtakið – eitt nú missurin av prentaðum pengaseðlum og missurin av »lender of last ressort« (aloftast landsins Landsbanki), hava minni týdning enn fyrimunirnir. Millum fyrimunirnir eru størri ferð á vinnulívið og íløgurnar, fall í kostnaðinum av peningaflytingum, ein størri og meiri flótandi fíggjarmarknaður, forðan fyri spekulatión í pengakursunum, og forðan fyri peningakurshandli og peningakurs ójavnum.

Íslendskir bankar vilja vera við, at við at nýta evruna avspeglar tað handilsskap teirra um alt Europa og ger peningakursirnar tryggari, skrivar Financial Times.

# Nýggjar orðabøkur á marknaðin í dag

**Størsta og kanska mest framsøkna orðabókaverk á føroyskum kemur í dag á marknaðin. Talan er um enskt-føroyskar orðbøkur, ið koma út sum bøkur, fløga og internethald**

ÚTGÁVA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*




*Mennirnir aftanfyri stórstu orðbókaútgávu í Føroyum nakrantíð, Anfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen*

*Savnsmynd*

Tað eru Annfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen, sum hava skrivað og ritstjórnað nýggju føroysku-ensku og ensku-føroysku orðabøkurnar, og seinnapartin í dag løgdur teir bøkurnar fram alment á samkomu á Læraraskúlanum.

Tað var mett at vera eitt stórt framstig fyri føroyskt mál, tá føroyingar í 1984 fingu ta ensk-føroysku orðabókini hjá Jóhannesi av Skarði. Men hann gjørdi fleiri ferðir sjálvur vart við, at henda orðabók var ov lítil at nøkta tørvin hjá næmingunum í hægru skúlunum. Tí kom nýggj enskføroysk orðabók út í 1992, sum Stiðin gav út. Annfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen vóru eisini við í tí arbeiðinum.

Tað eru soleiðis liðin 16 ár, síðani seinasta enska orðabókin kom út á føroyskum. Hesi árini hava Annfinnur í Skála og Jonhard Mikkelsen arbeitt við at gera nýggjar orðabøkur, og nú koma tær loksins á marknaðin.

Føroyska-enska orðabókin telur 1950 síður og er nógv tann størsta orðabókin, sum er útgivin í Føroyum.

Ensk-føroyska orðabókin byggir á ensku-føroysku orðabókina frá 1992. Hon hevur helmingin fleiri leitiorð enn tann gamla og telur slakar 1600 síður.

Felagið Sprotin gevur bøkurnar út.